# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*




## Menn og (ov nógv) vald

*Hanne-Vibeke Holst, Kongemordet, Gyldendal, 2005*



*Hanne-Vibeke Holst*

Nýggja skaldsøgan hjá Hanne-Vibeke Holst, *Kongemordet*, er møguliga ein lyklaskaldsøga við støði í nýligum hendingum í donskum politikki. Í øllum førum verður dúgliga gitt, um ikki offrið er Poul Nyrup Rasmussen og um tað kanska er Mogens Lykketoft, sum hevur lagt rygg til lýsingina av politiska “drápsmanninum”.

Linda, sum í meir enn 30 ár hevur verið gift við fyrrverandi fíggjarmálaráðharranum Gert Jakobsen, situr valkvøldið í 2001 og eygleiðir “skriðuna til høgru” í sjónvarpinum. Bert við at kveita at myndini sær hon, at maður hennara, annars kendur sum gløggasti ideologurin í Sosialdemokratiska flokkinum, hevur sett sær fyri at oyðileggja sín floksfelaga Per Vittrup og kanna sær sjálvum formanssessin. Hon sær tað, tí hon sjálv øll hesi árini hevur latið seg eyðmýkja bæði kropsliga og sálarliga av valdssjúka manninum. Drívmegin í *Kongemordet* er henda dupulta lýsingin av kvinnuni, sum elskar ov nógv, og manninum, sum hevur vald á øllum – uttan sær sjálvum.

Eins og *Kongekabale* hjá Niels Krause Kjær, vísir *Kongemordet*, at valdsspælið í donskum politikki kann skapa spennandi søgur. Um tað eisini kann skapa stóra skaldsliga list er heldur meir ivasamt.




Ummæli:

# Ræðusøgur úr gerandisdegnum

Nýggja skaldsøgan hjá Dagny Joensen Hvirlan er ein fólkslig ræðusøga, sum í ávísan mun gongur fyri seg í gerandisdegnum beint fyri eygunum á okkum

*Eins og lagnan hjá høvuðspersóninum, er* Hvirlan *ein fløkja av hálvum lygnum, eitraðari tøgn og gitingum*




*Dagny Joensen, Hvirlan, MGS, 2005*

Skaldsøgan byrjar í besta ræðusøgustíli. Ein ógvuslig hvirla skræðir úthurðina í huldukenda húsinum hjá gomlu Onnu upp á víðan vegg. Súmbolikkurin er tættur frá byrjan. Stríðið hjá gomlu Onnu at fáa hurðina aftur verður ímyndin av royndunum at tiga sannleikan um lagnuna hjá Onnu í hel. Men beint sum Anna hevur fingið hurðina aftur, sær hon eina unga gentu standa pinnastilla úti á bønum og eygleiða seg. Hóast Anna ongantíð hevur sæð gentuna fyrr, fær hon alt fyri eitt eina óunniliga kenslu av einum serligum sambandi teirra millum. Hesuferð letur Anna sjálv hurðina upp og letur gentuna koma inn. Og harvið eru dyrnar settar á glopp, so stóra loyndarmálið um barnið hjá Onnu kann byrja ...

### Samfelagsatfinning

Fýra kvinnur og trý ættarlið skulu til, áðrenn seinasti pettið í stóra puslispælinum liggur, sum tað skal. Á ferðini hartil fáa vit eina til tíðir sera beinrakna lýsing av lagnum og lívi í føroyska samfelagnum, har burturtigingin ofta er eitt lívskor.

Gamla Anna er miðdepilin í søguni, og eins og hennara lagna, er *Hvirlan* ein fløkja av hálvum lygnum, eitraðari tøgn og gitingum. Sum skaldsøga hevur bókin alt, sum skal til, fyri at fáa tað at renna kalt niðureftir rygginum á lesaranum. Kortini fangar søgan ongantíð heilt. Til tað tykist hon ov hugsað og eftirgjørd. Orkan, sum verður brúkt uppá at flyta persónarnir runt í snirkluta leikinum, tekur luftina úr teimum sum menniskju. Sum lesari vildi eg fegin fingið eina kenslu av, hvat tað ger við eitt menniskja sum gomlu Onnu at verða so náðileyst viðfarin. Í staðin siti eg eftir við einum journalkendum dømi um umsorganarsvik og sálarligan yvirgang.

Tað kann sjálvandi hugsast, at høvundurin við hesum frásøguhátti vil vísa, at í einum samfelag, sum  velur at tiga tað menniskjaliga í hel, mást tú sjálv kvetta tínar kenslur, um tú skalt yvirliva. Tað má verða tað einasta, ið til dømis kann forklára harðhjartaðu, køldu tøgnina, sum valdar í húsinum, tá Anna føðir sítt loyndarbarn. Sum samfelagslig atfinning rakar boðskapurin her lesaran sum ein múrsteinur í høvdið. Munandi meir fyndug er atfinningin, tá gamla Anna, sum ongantíð hevur verið hjá lækna fyrr, endar á landssjúkrahúsinum. Speiið svíður, tá vit síggja hana fyri okkum á hesi risastóru villiniborgini har stovnsfesta umsorganin verður tað nærmasta, hendan takksama, gamla konan kemur onkrum slagi av medmenniskjaligheit.

### Jøvn rútma

Skaldsliga verður ikki stílað høgt í *Hvirluni*. Hetta ein fólkslig ræðusøga, sum spælir á streingir, vit kenna best frá lættisoppabókum, har søgan sjálv svarar spurningunum heldur enn at bjóða hugflognum ella intellektinum hjá lesaranum av . Kapittulheitini minna mest um eitt millumting millum skúla- og terapibøkur, so sum “Dagsins skyldur hjá Onnu” ella “Fyrigeving og góðtøka”, meðan dialogurin tíðum er tyngdur av ovurtýðiligum boðskapum - til dømis móti endanum, tá sjálv lívsins meining verður tvinnað inn eitt gerandisprát millum ungu Onnu og 10 ára gomlu dóttrina.

Bygnaðarliga hevur høvundurin betri tak á síni søgu. Rútman er jøvn, og sum heild ferðast lesarin natúrliga saman við frásøgufólkinum inn og út úr ættarliðum og lagnum. Líka til seinast, tá ein innihaldsliga heldur malplaseráð ungdómsfrásøgn verður heft uppí søguna. Her hevði *Hvirlan* avgjørt staðið sterkari sum skaldsøga, um hon varð verandi søgan um lagnuna hjá gomlu Onnu.



*Dagny Joensen*

## Avlagað Jelinek?

*Elfriede Jelinek, Die Klavierspieleren, 1983, Umsett: Louise P. Hansen, Spillelærerinden, Tiderne skifter, 2005*




Mest kenda skaldsøgan hjá Elfriede Jelinek, sum vann Nobelvirðislønina í bókmentum í fjør, er nú komin á donskum. *Spillelærerinden* er ein tann mest umrødda týska útgávan í nýggjari tíð – ein skelkandi frásøgn um kynsligan kulda, einsemi og kvinnuliga masochismu.

Høvuðspersónurin Erika Kohut býr og svevur enntá í songini saman við ráðaríku og harðrendu mammu síni. Sambært mammuni er Erika eitt undirmett tónleikaflogvit, sum átti at verið ein heimskendur konsertpianistur. Í staðin er hon bara vorðin ein miðalhampa klaverlærarinna á tónlistaskúlanum í Wien. Har gekk Jelinek sjálv í síni tíð, og innlitið í tónleik kemur týðiliga til sjóndar í bókini.

Mamman heldur strangt eyga við øllum, sum Erika hevst at, serliga øllum sum hevur við kyns- og kærleikslívið at gera. Men fyri Eriku hevur kúgaða tilveran saman við mammuni avlagað allan natúrligan kynsligan ans. Hon megnar ikki at taka ímóti kærleikanum, tá hann bjóðar seg fram, og í staðin gongur hon og luskar runt um náttina og eygleiðir elskandi pør í parkini ella skøkjur, sum eru til arbeiðis.

Mikla øsingin í kjalarvørrinum av at Nobelvirðislønin í bókmentum varð latin Jelinek, stóðst lutvíst hennara lýsingum av kynslívinum. Væl eru tær besøgnar og ógvusligar, men um tær eru meir perversar enn vanligi pornofloymurin kring okkum, kann lesarin nú sjálvur meta um.

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**

Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo